# ALUFELGUR



**STÓRT ÚRVAL AV DEKKUM OG ALUFELGUM**

Dømi: 4 felgur 15" og 4 dekk 195/50x15

**EINANS 5.900,-**

**P/f Esmar Simonsen**
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo

# Frá Happadráttinum

**Seinasti søludagur til 3. drátt er hósdagin 18. mai**

| *Størstu vinningar* | |
|---|---|
| 1x | 250.000 kr. |
| 1x | 75.000 kr. |
| 1x | 60.000 kr. |
| 1x | 30.000 kr. |
| 2x | 25.000 kr. |
| 3x | 15.000 kr. |
| 7x | 10.000 kr. |
| 15x | 5.000 kr. |
| *Eykavinningur* | 15.000 kr. |

**Ágóðin av Happadráttinum: 1/3 fer til ÍSF og 2/3 fara í grunn, ætlað brekaðum**

**HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN**

# Frá 1000 ára haldinum

www.tusund.fo

**Fríggjadagin 12. mai kl. 20.00**
letur frams‡ningin um kirkjurnar í Føroyum upp í Leguhúsinum í Nesvík.
– J.P.Gregoriussen, arkitektur hevur skipa› fyri og grei›ir frá.

**Fríggjadagin 12. mai kl. 19.00**
heldur Heini F. Petersen fyrilestur um Mikkjal á Ryggi í Listaskálanum.
– Kóri› Glymur syngur.

**Sunnudagin 14. mai kl. 16.00**
heldur Magnus Jørgensen fyrilestur um Kaj Munk í kirkjuni í Saksun.
– Vestmanna Sangkór syngur.

**Sunnudagin 14. mai kl. 15.00**
heldur Jákup R. Hansen, prestur fyrilestur í skúlanum í Skúvoy.



RZ016

KPMG

# Roknskaparleiðari

Fyri P/F Svend Krosstein søkja vit eftir einum roknskaparleiðara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Roknskaparleiðarin, sum hevur beinleiðis tilvísing til stjóran, hevur ábyrgdina av teimum roknskaparligu viðurskiftunum hjá felagnum so sum

- at leiða og skipa dagliga arbeiðið í bókhaldi felagsins og tryggja, at bókhaldið støðugt er dagført
- debitorrøkt
- gjalding av ognarum
- mvg-uppgerðum felagsins
- ársroknskapi felagsins

Harumframt skal roknskaparleiðarin verða við til at viðlíkahalda og dagføra dagligu mannagongdir felagsins.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt spennandi og avbjóðandi framtíðarstarv.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til bókhald og roknskap
- er vanur at arbeiða við teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til
KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 22. mai 2000.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

***P/F Svend Krosstein rekur heilsølu við VHS-vørum v.m. umframt at felagið eisini hevur smásølu í handlinum uppi á Hálsi í Tórhavn. Harumframt eigur felagið fleiri bygningar, sum verða leigaðir út.***

***Hjá felagnum starvast í løtuni 17 fólk. Av hesum starvast 2 í bókhaldinum umframt roknskaparleiðaran.***

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34,
Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team 85 • 31 65 11

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

## Søkt verður eftir

royndum maskinførara. Stóra koyrikortið er ein fyrimunur.

**Sp/f í Djúpagili**
**Tlf. 215921 & 315921**



# *Bakaralærlingur*

**Bakarin í SMS søkir eftir bakaralærlingi at byrja beinanvegin.**



Ert tú morgunfrískur, ágrýtin og hevur áhugað innan bakarayrki, so ert tú kanska tann, vit leita eftir.

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert lærupláss í einum spennandi og nógv vitjaðum umhvørvi.

Er hetta nakað fyri teg, so er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn til okkum. Umsóknin skal verða okkum í hendi innan 28. mai 2000.

Umsóknin skal sendast til:

*Bakarin í SMS*
*Postboks 1059*
*110 Tórshavn*

***Bakarin í SMS***
***Tel 31 30 46***

# Minnisgrunnur Sonnu av Skarði

**Stuðul til teirra, ið søkja sær útbúgving í handarbeiðið.**

Á hundrað ára føðingardegi Sonnu av Skarði tann 19. apríl 1976 stovnaði Tórshavnar kommuna "Minnisgrunn Sonnu av Skarði".

Endamál grunsins er at menna og lívga føroyskt handarbeiði, føroyska handarbeiðsmentan og veita fólki, sum fáa sær handarbeiðsútbúgving í tóvirki (tekstil), fíggjarligan stuðul.

Tygum fáa meira at vita um minnisgrunnin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, telefon 315160.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og framtíðarætlanir í tóvirkisútbúgving skal sendast Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, merkt "Minnisgrunnur Sonnu av Skarði".

Freistin er sett til 12. juni 2000.

*Tórshavnar kommuna*



## Last- og kranavognskoyring

Øll last- og kranavognskoyring við grabba. Last 3 m³. Krani 1800 kg.

**Tlf. 312779 & 281478**

# Tað ber væl til

at vitja SMS og Apotekið hóast vegarbeiði




Hóast vegarbeiði á R.C. Effersøesgøtu verður gjørt fyri at betra og tryggja umstøðurnar við innkoyringarnar til SMS og Tjaldurs Apotek, eru tygum vælkomin at vitja okkum sum vanligt.

**Til og við sunnudagin 29. mai 2000**
kunnu tygum koyra inn og út, har pílar eru vístir.

Vælkomin í SMS og Tjaldurs Apotek

**SMS** **TJALDURS APOTEKIÐ**